VESTLAX

# Leiðari fyri innaneftirlit á Vestlax og Vestsalmon

A HAPPY FISH MAKES A HAPPY CUSTOMER

**P/F Vestsalmon**
Postbox 82
FO-410 Kollafjørður
Faroe Islands
Tel +298 477 000
Fax +298 477 001
vestlax@vestlax.fo

**Vit sóknast eftir einum ábyrgdarfullum leiðara fyri innaneftirlit okkara á Vestlax og dótturfelagnum Vestsalmon.**

**Starvslýsing**
Starvið er ein stápsfunktión við beinleiðis tilvísing til stjóran og fevnir um arbeiðsøkini matvørutrygd, umhvørvisvernd, fiskavælferð og í ávísan mun um arbeiðseftirlit og starvsfólkatrygd. Starvið fevnir eisini um upplæring av starvsfólki, viðlíkahald av innanhðsis mannagongdum, skrásetingar, stakroyndir og fundar- og projektleiðslu v.m.
Tú fært ábyrgdina av at samansjóða og skipa hesi arbeiðsøki og at lyfta innaneftirlitið á eitt høgt vitanarstøði í samsvari við altjóða mát og galdandi mannagongdir.

Tú fært ábyrgdina av øllum samskifti við myndugleikarnar og innkeypi av fakligari vitan og kanningum, ið viðvíkja ábyrgdarøkinum.

**Útbúgving og royndir**
Tú hevur hægri útbúgving sum t.d. djóralækni, matvøruverkfrøðingur, lívfrøðingur ella líknandi. Royndir frá almennu ella privatu vinnuni eru ein fyrimunur, men ikki ein treyt. Hevur tú áræði og evnini til at lyfta støðið, men ongar verkligar royndir, ert tú eisini vælkomin at søkja starvið.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um fulltíðarstarv, har skeivar arbeiðstíðir í ein ávísan mugu væntast. Høvuðssæti okkara er í Kollafirði, men arbeiðið fevnir um alt okkara virkisøki.

Kappingarfør løn og setanarviðurskifti verða avtalað í samsvari við royndir og førleika.

**Umsóknin**
Umsóknir við avriti av prógvi, møguligum viðmælum og starvsroyndum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. november 2006.

Frímund Hansen, stjóri, svarar fegin fleiri spurningum.
frimund@vestlax.fo

Vestlax og Vestsalmon eru ávikavíst móður- og dótturfeløg. Vit klekja rogn og framleiða smolt og smásíl. Vit ala laks og síl á sjónum. Vit slakta og hagreiða egnan fisk eins og annan fisk. Á søludeildini marknaðarføra og selja vit egnan fisk og fisk fyri onnur. Vit eru umleið 70 starvsfólk í felagnum.

sansir.fo

